**UTTAN ÚR HEIMI**

## Fiskimenn góðtaka oljuleiting

Hóast kanningar hjá norsku havrannsóknarstovuni hava víst, at oljuvinnan ávirkar arvaeginleikarnar hjá fiski, er norska fiskimannafelagið eftir øllum at døma til reiðar at góðtaka, at oljufeløgini fara undir at bora eftir olju og gassi í pørtum av Barentshavinum.

Aðalskrivarin í fiskimannafelagnum, Jan Skjærvø, sigur við tíðindastovuna NTB, at felagið er sinnað at góðtaka oljuleiting, men at felagið er ímóti, at oljufeløgini sleppa at bora á leiðum, sum hava serliga stóran týdning fyri fiskivinnuna. Tí ætlar felagið, at myndugleikarnir skulu friða trý øki úti Lofoten, Vesterålen og Troms fyri oljuvinnu, sigur hann. Orsøkin er, at hesi økini eru týðandi gýtingar- og uppvakstrarleiðir hjá toski og sild, sigur hann.

Norska fiskimannafelagið ger tó vart við, at skuldi tað víst seg, at oljuvinnan fær óhepnar avleiðingar fyri fiskastovnarnar, treytar felagið sær rætt til at krevja, at loyvi ikki verða givin á øðrum týðandi fiskileiðum.

## Gott hjá hjá partaeigarum

Alt bendir á, at árið í ár verður tað besta nakrantíð hjá teimum, sum hava sett pengar í partabrøv hjá teimum smáu og meðalsttóru donsku bankunum.

Sum dømi verður víst á bankan Sydbank, sum er sewrliga virkin í syðru helvt av Jyllandi. Tann 1. januar í ár varð virði bankans á partabrævamarknaðinum í Keypmannahavn 3,67 milliardir krónur, men nú er tað 5,97 milliardir krónur. Umleið 130.000 partaeigarar eru í Sydbank. Ein annar banki, sum eisini hevur havt eitt gott ár, er Skjern Bank, sum eisini heldur til í Jyllandi. Sambært JydskeVestkysten er virðið á partabrøvunum í hesum bankanum vaksið uppaftur meiri enn partabrævavirðið í Sydbank.

Blaðið vísir at enda á, at sambært nýggjastu upplýsingunum er vøksturin í Skjern Bank 118 prosent, í Tønder Bank er hann 93 prosent, í Kreditbanken 89 prosent og í Sydbank 63 prosent. Allir hesir bankarnir halda til í syðra parti av Jyllandi.

## Fekk tjúgu ár

Fyrrverandi forsetin í miðamerikanska landinum Nicaragua Arnoldo Aleman hevur fingið tjúgu ára fongsul fyri korrupsjón.

Tann 57 ára gamli Aleman var forseti í Nicaragua frá 1997 til 2002. Sunnudagin varð hann dømdur fyri svik, fíggjarundandrátt og valsvik. Hann hevur sitið í fongsli í seinastuni, men slapp úr fongslinum í síðstu viku, tí hann hevði trupulleikar við heilsuni. Hann slapp tó ikki leysur, men hevur sitið í húsavarðhaldi.

Sambært dóminum svikaði Arnoldo Aleman fyri næstan 100 milliónir dollarar, meðan hann var forseti. Hansara egnu floksfelagar hava greitt frá, at hann átti 50.000 dollarar, tá hann gjørdist forseti, men at hann hevði einar 250 milliónir dollarar á bók, tá hann fór frá.

## Persson giftur

Svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, giftist leygardagin við sambúgva sínum, stjóranum í rúsdrekkasøluni, Anitu Steen.

Tey bæði gjørdu ikki nógv burtur úr brýdleypinum, sum varð hildið í summarbústaðnum hjá stjórnini uttan fyri Flen í Sømlandi. Tað var forsætisráðharraskrivstovan í Stockholm, sum kunngjørdi brúdleypið. Hetta kom kortini ikki óvart á nakran, tí herfyri segði forsætisráðharrin, at hann ætlaði at gifta seg í vetur.

Bæði Gøran Persson og Anita Steen hava verið gift fyrr, og hetta er triðja giftan hjá forsætisráðharranum. Anita Steen er fødd og uppvaksin í Tróndehimi í Noregi. Eitt skifti var hon ríkisskrivari í stjórnini hjá Persson, og hon hevur kent nýggja mann sín í fimtan ár, skrivar svenska tíðindastovan TT.



*Vladimir Putin, forseti, var millum teir fyrstu veljararnar í Moskva sunnumorgunin. Úrslitið kemur honum væl við*

*Mynd: Reuters*

# Meiri vald til Putin

**Tjóðartingsvalið í Russlandi sunnudagin gekk, júst sum Vladimir Putin, forseti, hevði ætlað. Stuðulsflokkur hansara, Tað sameinda Russland, gjørdist tann stóri sigursharrin**

**RUSSLAND**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá góð 80 prosent av atkvøðunum aftan á russiska valið vóru taldar í gjár, hevði Tað sameinda Russland fingið 36,7 prosent av atkvøðunum. Kommunistarnir høvdu fingið 12,8 prosent, og flokkurin hjá tí víðgongda tjóðskaparmanninum Vladimir Zjirinovskij hevði fingið 12 prosent.

Valið gjørdist ein frammaná hjá kommunistunum. Á valinum fyri fýra árum síðani var flokkurin landsins størsti við 24,4 prosentum. Nú fekk hann bara 12,8 prosent. Sigurin hjá Tí sameinda Russlandi kom harafturímóti ikki óvart á nakran. Allar meiningakanningar undan valinum vístu greitt, at flokkurin fór at vinna.

– Hetta er ein sigur, sum vit kunnu vera errin av, segði formaðurin í vinnaraflokkinum, Ljubov Sliska, tá tað var greitt, at flokkurin hevði vunnið.

Tann avgerandi spurningurin er nú, um tað fer at eydnast Tí sameinda Russlandi at útvega sær stuðulsflokkar, so hann kann fáa tveir triðingar av sessunum í tinginum. Eydnast tað, er lítil ivi um, at tingið fer at samtykkja at broyta grundlógina, so Vladimir Putin kann stilla upp til forsetavalið í 2008. Tað kann hann ikki sambært verandi reglum í grundlógini.

Eygleiðarar í Moksva eru á einum máli um, at sigurin hjá Tí sameinda Russlandi fer at geva Putin uppaftur størri vald, enn hann hevur havt, og at talan í veruleikanum er um eitt meiri miðsavnað vald í Russlandi.

# Mugabe tveittur á dyr

**Zimbabwe sleppur ikki at vera í bretska samveldinum longur**

**BRETSKA SAMVELDIÐ**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ríkisleiðararnir í bretska samveldinum samdust á fundi um vikuskiftið at koyra Zimbabwe úr samveldinum.

Tað var bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, sum gekk á odda í stríðnum fyri at koyra Zimbabwe og og landsins umstrídda forseta, Robert Mugabe, út í myrkið. Zimbabwe varð fyribils koyrt úr samveldinum í mars í fjør, eftir at Mugabe gav sær sjálvum sigurin á forsetavalinum, sum altjóða samfelagið sýtti fyri at viðurkenna orsakað av illgruna um umfatandi valsvik.

Suðurafrikanski forsetin, Thabo Mbeki, royndi til tað síðsta at forða samveldinum í at taka limaskapin frá Zimbabwe, men hann slakaði kortini, tá saman um kom.

Tá hetta var greitt, kunngjørdi zimbabwiska stjórnin, at landið fer at taka seg úr samveldinum.



Cresswell frá Press & Journal:

# Oljufeløg mugu liva upp til sínar skyldur

**Hóast myrk skíggj eru fyri framman, so mugu føroyingar lata sær linda, at tað tekur tíð at finna oljuna og ikki minst á Atlantsmótinum, og at hetta økið í løtuni ikki er tað mest áhugaverda. Men umráðandi er eisini, at føroyingar tvíhalda u, at feløgini liva upp til sínar skyldur og ikki rýma í hálvum gekki segði Jeremy Cresswell á oljuráðstevnuni í vikuni**

**OLJURÁÐSTEVNA**
*Jan Müller*

Millum gestarøðararnar á Oljuráðstevnuni í vikuni var Jeremy Cresswell frá skotska blaðnum Press and Journal. Hann hevur drúgvar royndir í fakinum og hevur serstakliga skrivað um oljutilgongdina í Bretlandi. Hann hevur eisini tikið víðari útbúgving innan oljumál. Cresswell málaði eina rættiliga svarta mynd av Atlantsmótinum men vísit samtíðis á, at tað fer at taka tíð at finna oljuna. Hann vísti á, at oljufeløgini heldur leita til onnur øki at gera íløgur, tí tey eru bíligari. Hann helt, at áhugin fyri at gera stórar íløgur í leiting í hesum heldur fjarskotna økinum sum Føroyar eru partur av, er sera lítil í løtuni og einki røkist fyri, at hetta fer at broytast í næstum. Hann metti, at vit skulu ikki verða kløkk, um tað ganga ikki bara 10 ár men 15 ella 20 ár, til nakað ítøkiligt fer at síggjast aftur á Atlantsmótinum.



*Jeremy Cresswell her saman við Ben Arabo og Magna Arge eftir ráðstevnuna*

*Mynd Jan Müller*

Jeremy Cresswell segði seg bera ótta fyri, at feløgini ella nøkur av feløgunum, sum eru virkin við Føroyar, fara at royna at sleppa burtur úr sínum bindingum og nevndi í hesum sambandi BP og Amerada Hess. Nú BP hevur verið ein av drívkreftunum á Atlantsmótinum kundi tað vera eitt stórt bakkast, um tað tók seg aftur. Hvat Hess víðvikur segði Cresswell, at hjá tí var meira talan um eina heildarmeting, har nýggja leiðslan í felagnum við sæti í USA meira ella minni vildi taka seg úr Norðsjonum og Europa sum heild.

Útlendski oljujournalisturin helt annars ikki, at oljufeløg, sum høvdu fingið leitiloyvi og høvdu bundið seg til at gera íløgur við Føroyar, áttu at sloppið burtur úr hesum bindingum við eitt nú ”horsetrading” sum hann málbar seg. . Ein kundi týða orðini hjá Cresswell sum eina áminning á føroyskar oljumyndugleikar um at ansa eftir, at oljufeløgini ikki bóru seg undan sínum skyldum. Annars helt hann tað vera sera óheppið, at so nógvir upplýsingar frá boringum verða hildnir loyniligir. Hava feløg t.d. ikki rakt við olju í eini týðandi boring, so átti hetta at komið út til almenningin.

Morgan Goodlad, stjóri í hetlendska oyggjaráðnum:

# Norrøna alstóran týdning fyri menning í økinum



*Norrøna stóran týdning fyri Hetland*

**OLJURÁÐSTEVNA, LERWICK**
*Jan Müller*

Á oljuráðstevnuni í Lerwick herfyri varð eisini nomið við onnur mál enn júst olju og føðingardagin hjá eini av høvuðslívæðrunum í hetlendka búskapinum, Sullom Voe. Fiskivinnan varð eisini frammi. Morgan Goodlad, stjóri í hetlendska oyggjaráðnum, The Shetland Island Council, nevndi í sínum innleggi, at hóast fiskivinnan, við alingini á odda, stendur fyri størsta partinum av búskapinum eftir veitingarnar frá stýrinum, so er kreppa í hesi vinnuni. Stór afturgongd er í veiðuni eftir toski og hýsu. Hetland hevur orsakað av minkaðu kvotunum verið tvungið til at minka um henda partin av flotanum við 25% teir seinastu 12 mánaðirnar. Tað vil fáa álvarsligar fylgjur fyri tey mongu fólkini, sum manna skipini, fyri fólk í landi, sum framleiða ís, fólk í matvøruídnaðinum og hópin av øðrum. – Hetta er nakað, sum enn ikki er farið at merkjast veruliga í samfelagnum, men talan er um eina sera álvarsliga støðu sigur Morgan Goodlad. Úrslitið er, at landingar av fiski í Hetlandi eru minkaðar við eini helvt. Samtundis hevur tað tó víst seg at standa betri til í tí partinum av fiskiflotanum, sum veiðir pelagiskan fisk. Hesin er í stórum vøkstri og stendur fyri 23% av inntøkunum í fiskivinnuni. Hetlendingar hava gjørt stórar íløgur í ein sera nýtímans nótaflota.

Tað, sum er ringt fyri ein, kann so vera gott fyri ein annan. Morgan Goodlad sigur, at henda støðan sjálvandi fer at økja um eftirspurningin eftir fiski úr Føroyum. Tað hendir longu nú. Tá Norrøna kom til Lerwick týsdagin, sama dag sum oljuráðstevna varð hildin har, vóru 15 bingjur við feskum fiski úr Føroyum. Nakað fór í land í Hetlandi, nakað fór til Skotlands og so víðari til Bretlands.

Hóast oljan oftani verður havd á lofti, tá tað um Hetland viðvíkur, so er tað sum sagt í veruleikanum fiski- og alivinnan, sum standa fyra størstu inntøkunum til samfelagið, í dag umleið 42%, harav alivinnan útger langt tann størsta partin, umleið 62% av framleiðsluni í fiskivinnuni. Olja stendur fyri 16% av inntøkunum, meðan "Council Spending" tvs. tað oyggjaráðið rindar, stendur fyri 33%. Hetta eru í stóran mun inntøkur, sum eru komnar frá oljuvinnu og pengum úr Skotlandi, og sum mest verða brúkt til infrastruktur, mentan og skúla, eldraøkið oa. Ferðavinnan stendur fyri 4% og landbúnaðurin somuleiðis. Flestu arbeiðsplássini í Hetlandi í dag, 63%, eru í tænastuvinnuni og hetta er nakað, sum hetlendingar ynskja broytt og tí hyggja teir eisini nógv til Føroyar fyri at finna fram til, hvussu man kann økja um tann framleiðandi partin av búskapinum, her m.a. fiskivinnuna, ein støða, sum tó er torfør, nú kvotuavmarkingar hava lagt stóran part av flotanum.

Nú oljan minkar og harvið inntøkur til størsta arbeiðsgevaran í Hetlandi, Shetland Island Council, minka, merkir tað, at inntøkur mugu koma aðrastaðni frá, tvs.frá fram-leiðandi vinnulívinum, og tað verður tí nógv gjørt í Hetlandi fyri at menna ymsar framleiðslur so sum landbúnað, og stórur dentur verður lagdur á marknaðarføring av bæði lambskjøti, aldum fiski oø.

Tað, sum hevur hildið lív í stórum parti av hetlendska samfelagnum, eru teir mongu grunnarnir, har oljupengarnir eru goymdir. Men minkar oljuframleiðslan, so gongur tað eisini út yvir hesar grunnar, sum tá standa í stað ella minka.

### Norrøna alstóran týdning

Morgan Goodlad, sum er nevndarlimur í Smyril Line, vónar, at samstarvið um Norrønu kann gagna bæði Føroyum og Hetlandi, og vísir á, at eitt nú flutningsleiðin hjá Norrønu kann vera við til at bøta um støðuna í hetlendska fiskiídnaðinum, nú man kann fáa rávøru úr Føroyum sjóvegis.

Uppá fyrispurning um hetlendingar eru sinnaðir at seta fleiri pengar í Norrønu, um skipið ikki fer at mangla kapital, sigur Morgan Goodlad, at tað enn ikki er tørvur á meiri pengi. Tey royna at fáa vetrarskránna at virka. – Vit hava havt eitt gott summar, sum kann verða við til at lyfta fyri veturin, men tað er ikki nokk, tú mást eisini finna eina lønandi vinnu fyri veturin.

Tá tíðirnar ikki eru alt ov góðar eru altíð gitingar í luftini. Morgan Goodlad vísir avgjørt tí gitingini aftur, at hetlendingar við sínum mongu oljumillíónum kundu hugsað sær at yvirtikið Norrønu, um hon ikki ber seg. – Tað hava vit ongar ætlanir um. Vit vilja bara vera við til at skapa eina rutu, sum ber seg.

– Men hví ikki sigla til Edinburg ella Aberdeen, har tað er ein nógv størri kundaskari heldur enn til eitt so lítið pláss sum Lerwick?

– Eg fari at venda spurninginum og spyrja, hví sigla uppá Tórshavn. Um tað bara er talan um at fylla skipið, so burdi man farið til Karibiska havið alt árið og ikki til Lerwick, Tórshavn og Seyðisfjarðar yvirhøvur. Eg havi altíð skilt, at okkara íløga var fyri at tæna okkara smærru samfeløgum. Vit gjørdu eina strategiska íløgu, har vit vilja hava Norrønu at sigla uppá Lerwick eins og tit vilja hava hana at sigla uppá Havnina. Hetta merkir, at vit ikki í næstu framtíð eru áhugaðir í sambandi við Skotland. Partaeigarnir ynskja at fáa lønsemi úr eini íløgu, sum dúvar uppá verandi rutu.

Morgan Goodlad leggur aftrat, at hetlendingar hava júst sama áhuga í Norrønu sum føroyingar hava tað, nevniliga at skipið kann vera við til at økja flutningin av fólki og góðsi til og frá Hetlandi. Morgan Goodlad sær eisini fegin, at Atlantsflog fer at flúgva uppá Hetland.

Morgan Goodlad ivast annars ikki í, at spurningurin um at finna olju við Føroyar, er ein spurningur um tíð. Hann trýr eisini uppá eitt gott samstarv millum føroyingar á hetlendingar á oljuøkinum. – Vit hoyrdu Stephen Timms, oljumálaráðharra tosa um at lýsa fleiri nýggj leitiøki vestan fyri Hetland út til oljufeløgini og vónandi fer tann útbjóðingin at gagna øllum økinum.